Svenning av Lofti 70 ár

Mikudagin 16. september fyllir Svenning av Lofti sjeyti ár.

Svenning er eiðismaður sum hevur búð í Havn síðan miðskeiðis í 50-unum. Hann er útbúgvin prentari og hevur seinastu meira enn 30 árini virkað sum evangelistur í brøðrasamkomunum í Føroyum. Hann hevur eisini verið virkin í felagnum Sinnisbæti, har hann eisini hevur verið formaður, umframt at hann hevur givið fleiri bøkur og traktatir út.

Svenning er giftur Birgit, f. Restorff, úr Havn. Tey eiga synirnar Petur, Marner og Dan.

Føðingardagurin verður hildin í Ebenezer mikukvøldið 16. september. Byrjað verður kl.18.45 við eini almennari og fjølbroyttari sangløtu.

- red

Børn og foreldur í barnagarði

Í sambandi við rørsluárið í ár skipaði Barnagarðurin í Miðvági fyri einum serligum rørsludegi fyri børn og foreldur fríggjadagin 11. september. Rørsludagurin byrjaði kl. 15, tá leiðarin á stovninum, Mirjam Kjølbro, beyð vælkomin, og síðan setti borgarstjórin dagin.

Børnini vóru deild upp í aldursbólkar, soleiðis at øll tey 3 ára gomlu vóru fyri seg, tey 4 ára gomlu fyri seg o.s.fr. Fyri at síggja hvønn bólk børnini hoyrdu til, høvdu tey fingið blusur frá bankunum: Eik, Føroya Banka, Norðoya Sparikassa og Suðuroyar Sparikassa.

Aktivitetirnir vóru skipaðir soleiðis at deild var upp í fýra breytir ella banar. Bani 1: Ymisk rennispøl har t.d. børn renna við einum foreldri við bindi fyri eyguni, har tey skuldu hoppa og lakka samstundis sum tey alla tíðina leiddust. Bani 2: Ymisk spøl sum t.d. banka kjøt, stjala klemmur frá hvørjum øðrum og fanga hvønn annan í langar ketur. Bani 3: Ein sjórænarabani við ymiskum forðingum. Bani 4: Dansur og spøl, balóndansur, samba við appelsinum. Børn og foreldur vóru 15 minuttir á hvørjum bana. Alliraktivetetirnir varð lagdur soleiðis til rætttis, at øll børnini kunnu verða við, samstundis sum tað einstaka barnið var í fokus.

Aftaná var ein hugnaløta har øll fingu frugt frá PM-Heilsølu. Fyrireikararnir siga, at tey høvdu ein góðan dag saman, har øll stuttleikaðu sær óført.

- red

Myndir: Barnagarðinum í Miðvági

Andlát og jarðarferðir

Andrias Nolsøe, Trongisvágur, fer til gravar úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 13.

Ingibjørg Johannesen, Tórshavn, andaðist í heiminum hjá dóttrini sunnudagin, 84 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið kl. 18 heim í Ebenezer. Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Ingibjørg, kunnu lata Zarepta eina gávu, konta í peningastovnunum.

Poul Johannes Zachariassen, ættaður av Sandi, búsitandi í Havn, fer til gravar úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 14. Tey, sum ynskja at senda blómur ella krans kunnu í staðin lata eina peningagávur til Javna. Konta í peningastovnunum.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

Ingibjørg Johannesen
Tórshavn

andaðist í heiminum hjá dóttrini sunnudagin,
84 ára gomul.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum
hóskvøldið kl. 18.00 heim í Ebenezer.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin kl.14.00

Familjunnar vegna
Ruth og Johannes v/ fam.

Tey, ið vilja minnast Ingibjørg, kunnu lata Zarepta eina gávu,
konta í peningastovnunum

Tøkk

Eina hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu tá kæri maður mín

Niels Jacob Madsen
(Niels á Teigunum)
á Sandi

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur til Tilhaldið Hugnan.
Hjartans takk øll, sum hjálptu til á ymsan hátt í sambandi við jarðarferð og ervi.
Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Marianna við familju

Dagurin

Dagurin eitur Mariumessa síðari 15. september. Mariumessa síðari. Dagur hildin til minnis um ta sálarneyð, sum gekk á Mariu Moy fyri tær líðingar, sonurin mátti tola. Í summum álmanakkum stendur eisini navnið Áskel, ið er sama navnið sum svenska navnið Eskild. Trúboðarin Eskild varð steinaður í hel við Eskildstuna í Svøríki umleið ár 1080. Áskel merkir gudahjálmur.

(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)